# Einki porno, bara frekt

RÚNI DJURHUUS



Byin.fo hevur aldrin lýst við PORNO, bert The hot spot. Ein stubbi á portalinum er ikki ein lýsing fyri byin.fo , men ein misskiljing á portalinum hevur fingið alt upp í kók.

Vit vísa aftur, at talan verður um eitt "pornokvøld" í Eclipse hetta vikuskiftið.

Talan er bert um eina áheitan – eins og grýlukvøldini - at fáa fólk at gera okkurt serligt burturúr klædnastílinum.

Eg vil staðiliga vísa aftur, at talan er um eitt pornokvøld. Talan er bert um eina áheitan – eins og grýlukvøldini – at fáa fólk at gera okkurt serligt burtur úr klædnastílinum.

Tað hevur skapt mikið rumbul í fjølmiðlunum um, at byin.fo hevur lýst um "Hot spot-kvøld" í Eclipse fríggjakvøldið. Fólk hava ringt til ymisk og klagað, og í almenna loftmiðlinum verður evnið eisini lýst at vera nakað, ið hoyrir ongastaðni heima.

Eg skal viðganga, at lýsingarherferðin kanska hevur verið nakað frek, men talan er ikki um eitt pornokvøld, eins og tíðindini í Útvarpi Føroya vil gera tað vil.

Orsøkin til "Hot-spot-kvøldið" er at royna okkurt nýtt. Eitt tiltak, har fólk lata seg eitt sindur meira summarslig í. Porno er tað ikki. Vit taka sterka frástøðu frá tílíkum.

**Viðmerking:**
Tað er Sosialurin, sum hevur skrivað um tiltakið hjá Eclipse á Portalinum. Spurdur um vit kundu skriva, at talan var um eitt porno-tiltak svaraði Rúni Djurhuus, at "tað kann man gott kalla tað".

So um talan er um eina misskiljing, so eigur Rúni Djurhuus hana sjálvur, og IKKI Portalurin.

*Blaðstjórin*

# Gevið nú alternativu vinnuni og tónleikinum ein kjans – bara nakrar fáar krónur – er ynskið!

FRÍÐÁLVUR JENSEN



- Politiski myndugleikin gremur seg, nú toskurin skal verjast – hví ikki geva øðrum vinnugreinum ein kjans – "come on"

Vit eru vitni til eitt alsamt størri kjak, um vit eiga at veiða meira av toski ella ikki, og ein situr við hesi kensluni av, um tað nú aftur endar galið – sum vit minnast aftur frá kreppuni á sinni.

Ikki er tað løgið, tí tað vóru og eru sanniliga nógvar lagnur, sum enn hava sett síni spor, og tí eiga vit at hugsa meira í øðrum banum.

**Endurtøka er allarhelst neyðug**
Tá ein roynir at taka lut í almenna kjakinum, er tað líkasum, at ein fær hesa kensluna av, at hetta hevur tú jú sagt fleiri ferðir, men er tað allarhelst neyðugt.

**Hví skulu kravgongur til?**
Eitt nýtt fyribrigdi er, at nú eru bólkar farnir at reisa seg við kravi um síni rættindir, og tað boðar frá, at nú er tíðin komin til, at játtandi myndugleikin eigur at síggja skiftina á vegginum – og taka hesi krøv til sín.

Eg kann minnast frá tíðini, tá eg og onnur royndu at gera okkum tankar um eina ella aðra alternativa- og tónleikaliga vinnu, at tað fór neyvan at verða lætt at fáa endarnar at røkka saman.

Tá hugsað verður um tølini, vit hoyra og síggja í hesum døgum, er tað líkasum at ein verður tikin av fótum.

Tosa vit um fíggjarligu samsýningina til tónleikaundirvísingina, er hetta meira talan um ein dropa í havinum (myndalig tala), so hvat er veruligi trupuleikin hjá tykkum politikarum??

**Síggja tit ikki ljósið?**
Tað er nú einaferð so, at verður eitt oyra givið, hevur hetta ofta eina ella aðra synergi-effekt við sær, tí fíggjaligi íblásturin setur nakað ígongd, og tí SKAL poltitiski myndugleikin føla ábyrgd og geva seg í trætuni um samsýningina til tónleikaundirvísingina!

Fruktirnar kenna vit frá øðrum tónleikaligum ávøkstum – so "come on"!

# Nýsamgonga

MANNBJØRN JACOBSEN



**Okkurt er við at henda í danska politiska landsskapinum**

Sum upp úr ongum er ein flokkur við at gerast veruleiki í fólkatingssamanhangi. Sjálvt um nýfígin áhugi eisini er, er flokkurin veruliga ein høttan móti verandi etableraðu flokkunum, her íroknað Dansk Folkeparti.

Flokkurin er enn ikki ein veruligur flokkur, at kallað, hann hevur onga skrá enn, kanska taktiskt, men meir ein leys skipan við samhugandi fólki ymiska staðni frá í politiska spektrinum, tó ikki út á veruligan vinstravong, fegin nakað út á høgravong. Hann verður móttikin við løgið tigandi samtykki frá øllum flokkum sum um teir eru í einum blandi millum bangni og vónir, ella teir síggja ein fong burturúr ongum, sum kann vera teimum til nyttu. Hetta síðsta er týðiligt fyri sosialdemokratarnar hjá nýkosna formanninum har Thorning Smith, sum haraftrat er ein kvinna fyri fyrstu ferð. Her velst um, hvønn hann etur av.

Vinstra eru bangnir í loyndum, men játtandi í orðum, tí tryggi einfaldi meirilutin yvir Dansk Folkeparti bara yvir tveir tøppir at trísta á, fløttafólk og skattasteðg, viðhvørt bert fyrra, kann skjótt vera burtur, og er enntá eitt av fáu kunngjørdu endamálunum hjá nýggju samgonguni. Møguleikarnir eru jú har, at ein borgarligur flokkur kemur aftrat, sum skuldi kunna minka um vónirnar hjá sosialdemokratunum at vinna stjórnarvaldið aftur.

Eru teir vinarliga sinnaðir móti nýggju floksbygginini, t.d. við at seta vónrík ráðharrastørv í eygsjón hjá ráðharravónbrotnum kristia nsborgpolitikkarum, kunnu teir benda veljaraveiðuna hjá flokkinum meiri yvir á radikalu og sosialdemokratarnar. Eru teir stívir, eru góðir møguleikar hjá nýggju samgonguni, at gera atsókn móti teirra veljarum, har veikar perur eru at fáa á tal, og helst er ein høvuðsætlan við nýggja flokkinum.

Konservativu eru eitt sindur ivandi um nýggja flokkin, men vinarliga sinnaðir. Teirra flokkur er eisini eitt fyrimál fyri veljaraveiðu hjá nýggja flokkinum. Nøkur falla frá, neyvan heilt nógv. Ein í trýmannaráðnum í sjálvari brádligu kunngeringini G. Seeberg, ein hálvkendur politikkari, er fallin frá. Hon er sum er limur í EU tinginum, hevði ikki tungar ráðharrasessir í Slútertíðini og onkuntíð aftaná. Um flokkurin eydnast sum ætlað, kann hon fáa týðandi lut.

Konservativu altera minni sosialdemokratarnar enn Venstre og kenna seg tí eitt sindur tryggari.

Eitt mál, nýggja samgongan tekur upp, minni skattur, skotið er upp 40% eindarskattur!, er í tráð við teirra mál, minni skatt á hægri inntøkur, tey seinastu árini. So her kann enntá samljóð skapast.

Trupuleikin hjá Venstre er her, at teir í seinastu taktisku bendingini móti sosialdemokratunum, í taktiskari samgongu við Dansk Folkeparti, eru upplagt offur hjá nýggju samgonguni, júst tí hann nú leggur dent á vælferðina, í tí royndini. Nýggja samgangan kann tað, uttan Dansk Folkeparti.

Eitt veruligt álopsmál fyri nýggju samgonguna er Dansk Folkeparti, og er tað einastu flokkur, sum ikki er óblandað vinarliga sinnaður. Teir eru ikki í stjórnini, men verða av øllum mett sum veruliga trygdin fyri sitandi stjórn við so at siga veto rætti. Teir kenna sjálvandi hendan leiklut høttan, og kanska hvørvur hann, men ikki grundleggjandi málið fyri teirra tilveru, øttan fyri útlendsku (islamisku) innrásini í Danmark.

Fyrsta atsóknarmálið fyri nýggja flokkin er Radikalu, sum gjørdust óvanliga stórir til seinasta val við at mótmæla júst útlendingapolitikkinum. Fult av javnaðarveljarum og veljarar í SF fóru tann vegin av tí orsøk. Har var við at koma eitt samljóð í, so bara Eindarlistin stóð uttanfyri. Nakrir politikkarir eru falnir frá her m.a. formaðurin fyri nýggju samgonguna Naser Kader og ein minni kendur, men royndur politikkari har Anders Samuelsen, og fleiri veljarar møguliga við, møguleikin er helmingurin.

N. Kader, sum er innflytari frá Sýria, er vælumtøktur kristiansborgpolitikkari og mest kendur sum stovnari av fylkingini Demokratiskir muslimar, vendur móti víðgongdu og fundamentalu iaslamtrúgvandi, sum hava fingið navnið islamistar. Hann lýsir seg sjálvan sum fyrrverandi ikki demokrat, men hevur lært demokrati í Skandinavia, Danmark sum nakað virðismokið, sum sum hann heldur fast um.

Ósemjan er av ymiskum slag og ymiskar vegir, umframt um sitandi formann, sum verður hildin einvís og stívrend, ikki so nógv innflytaratrupuleikin - teir halda mestsum, at radikalu eru ov blíðir her - sum einvísa peikanin á Thorning sum statsmálaráðharraevni. Her peika teir á Mogens Fogh, men neyvan so einvíst sum teir siga, og ein møguleiki er helst til broyting her. Tað kundi stutta fjeppingin hjá Sentrumsdemokratunum, sum endaði ikki játtandi, týtt á. Teir meta heldur ikki radikalu fyri at liva upp til ein miðflokk, sum er annað kunngjørda endamál fyri plássinum hjá teimum sjálvum, men fyri at vera ov vinstrasinnað vendan. Vinarlig viðurskifti eru neyvan í álvara millum nýggja flokkin og radikalu. Her líkist ov nógv veruligum kappingarneytum.

Sosialistisk folkaflokkurin hevur heilsa nýggju royndini vælkomin, tí hon brýtur blokkpolitikkin, sum er eitt triðja endamáll hennara, og kanska kann sum nýggi formaðurin har sigur lokka Dansk Folkeparti út úr donskum politikki.

Eindarlistin er uttan størri áhuga í hesum sambandi uttan, at hann eisini hevur áhuga í at knúsa blokkpolitikkin.

**Samanberingar**
Ikki óvantað er nýggja royndin borin saman við politiskar spjaðingar frá fyrr av og við floksroyndir frá fyrr av. Summar eru komnar og farnar, aðrar eru livandi veruleiki enn.

Radikalu, sum má vera høvuðsflokkurin fyri spjaðingini, er sjálvir úrslit av spjaðing i Venstre í 1905, býarintellektuellu og húsmenninir fóru frá, eftir vóru bøndirnir í Venstre, sum teir seinnu árini siga forvæl til og søkja at býunum, teirra akilleshælur, so fleiri avskallingar frá sosialdemokratinum, sum í flestu førum fóru til vinstrusíðu, um Glistrupflokkurin ikki verður roknaður frágingin høgravonginum í sosialdemokratunum og ella Dansk Folkeparti, og í sentrumsdemokratarnir til høgru.

Av hesum er mest samanborið við sentrumdemokratarnar, tí teir brutu við sosialdemoktatarnir, tí teir hildu flokkin, ávirkaðan av vinstravonginum, at hava farið ov langt til vinstru.

Munurin her fer kanska at kunna sigast at vera, at sentrumsdemokratarnir tóku veljarar frá vinstrusíðu og drógu til høgru inn móti miðjuni, meðan Nýsamgongan tekur flestu veljarar frá høgra og dregur inn móti miðjuni.

**Møguleikar**
Í sjálvum navninum liggur ein fráboðan um nýgggjar samgongumøguleikar sum ætlan t.e. yvir miðjuna.

Um flokkurin veruliga kemur inn við 20 fólkatingslimum, seinastu kanningar vísa 14, sum summar kanningar týða á, mest vónríku 29 beint í byrjanini, so er ein høvuðsuppgáva hjá flokkinum eydnast, at fáa danska fólkaflokkin út sum avgerandi flokk í stjórnarmøguleikum. Ein automatisk fylgja verður heilt víst eitt formansskifti í Radikalu innanfyri stutta tíð, eitt ólokið talv frá síðsta fólkatingsvali, har tað eyðnaðist radikalu at kapra nógvar radikalar vinstravongsveljarar, sum bjargaði formanskvinnuni har frá sekking, so formaðurin í SF ístaðin og óvæntað reyk.

Ein orsøk til nýroyndina kann eisini júst síggjast sum ein fylgja av tí. Fasta tilknýtið hjá Radikalu til sosialdemokratarnar.

Væntast kann at nýggja flokssamgongan í hvussu so er fer eftir førimuni at útnytta fyrimunaliga støðu sína, sum søguliga er støðan hjá Radikalu, at hava avgerandi lut sum sjálv miðjan.